# Fjaldu rúsevni í fiski

Tað er næstan einki mark fyri, hvat rúsevnasmuglarar kunnu finna uppá, tá tað ræður um at smugla rúsevni millum lond. Tað máttu myndugleikarnir í Uruguay sanna, tá tollararnir har nú um dagarnar funnu 300 kilo av rúsevninum kokain í frystilastini á einum fiskiskipi. Fishing News skrivar, at talan er um eitt línuskip, sum fyrr hevur siglt undior bretskum flaggi, men er selt til Uruguay. Hetta er tó ikki fyrsti tilburðurin av hesum slagnum, tí fyrr í ár funnu spanskir tollarar meiri enn tvey tons av rúsevni, sum lá fjalt í lastini á einum fiskiskipi.



# Sveiggj oyðileggja byggivinnuna

**Stóri munurin á góðum og ringum tíðum í byggivinnuni ger, at tað er torført hjá byggivinnuni at varðveita dugnaliga arbeiðsmegi í Føroyum. Hetta ger tað lættari hjá útlendingum at koma framat og er sum heild ein trupulleiki fyri samfelagið, heldur stjórin í Havnar Timburhandli**

*Edmund Jacobsen*
*edmund@pressecentrum.dk*

**Sveiggini í føroysku byggivinnuni eru munandi ógvusligari enn í øðrum londum. Og tí kunna vit takka politiska valdinum fyri.**

**Tað heldur Heini Fosaa, stjóri í Havnar Timburhandli:**

**- Tað líkist púrasta ongum. Politikarar hava í áravís tosað um neyvari stýring av virkseminum, so vit ikki uppliva tey sera ógvusligu sveiggj, sum føroyska byggivinnan má liva við. Men onki er gjørt enn, sigur Heini Fosaa.**

**Hann peikar á, at øktu almennu inntøkurnar verða brúktar upp í góðum tíðum, heldur enn at tað almenna roynir at halda aftur og spara upp, so eitt sindur er eftir til virksemi í verri tíðum.**

**Hann hugsar ikki bara um inntøkurnar hjá byggifyritøkunum, men eisini um føroysku handverkararnar, sum ofta mugu fara av landinum fyri at finna arbeiði, tá ið niðurgangstíðir eru í Føroyum:**

**- Úrslitið er, at vit missa allar teir sera virðismiklu førleikarnar, sum okkara handverkarar hava. Teir koma jú ikki heimaftur beinanvegin, tá ið tíðirnar venda aftur til tað betra.**

**Hetta ger so aftur, at útlendskar fyritøkur og hándverkarar taka ein bróðurpart av arbeiðinum, sigur Heini Fosaa.**

**- Í staðin fyri at seta ferð á nýtsluna, tá ið skattainntøkurnar fara upp - og harvið eggja til yvirupphiting av búskapinum - so átti politiska valdið at stýrt soleiðis, at færri almennar verkætlanir vóru settar í verk í góðum tíðum. Hetta hevði verið ein fyrimunur fyri føroysku byggivinnuna, handverkararnar og føroyska búskapain, sigur Heini Fosaa.**



er príslegan á veg niðureftir. Matur og brennievni kostar alsamt minni, og kostnaðurin á byggitilfari fellur eisini, tí útboðið er við at finna ein javnvág við eftirspurningin, sigur stjórin í Havnar Timburhandli.

- Eg vænti eisini, at lønirnar til handverkarar fara at minka, og tað er eisini við til at stimbra virksemi. Vit skulu ikki nógv ár aftur tá ið lønirnar vóru um 150 krónur um tíman. Seinastu tíðina hevur tað ikki verið óvanligt, at handverkarar tjena um 300 krónur um tíman. Hetta - og onnur viðurskifti - hava gjørt alt nógv dýrari enn gott er, sigur Heini Fosaa víðari.

## Neyvan kreppa

Havnar Timburhandil hevur ongar ætlanir um at niðurleggja nakað virksemi ella at siga fólki upp, nú niðurgangstíðir eru fyri framman. Hetta tí at fyritøkan longu seinasta summar dugdi at síggja, at góðu tíðirnar skjótt fóru at enda. Tískil hevur Havnar Timburhandil havt stundir til at tillaga seg til fallandi virksemi.

- Eg haldi ikki at vit skulu tosa um kreppu. Tað verður neyvan so ringt, sum fleiri vænta. Vit fara at uppliva niðurgongd næstu tvey árini. Tað var væntað, sigur Heini Fosaa.


Grafikmaster tel 227000

# Eitt lítið KT-virki er blivið 1 ár



Vit hava loyst uppgávur innan Microsoft SharePoint fyri smáar kundar við 10 starvsfólkum og fyri stórar kundar við 1.6 mió brúkarum á teirra ekstraneti.

Hava eisini verið ráðgevar og undirveitarar í sambandi við verkætlanir á 1.3 mia krónur.

Stutt sagt, so elska vit at loysa uppgávur í SharePoint!

intra

intra@intra.fo
+298 599 123

SKRÁSETTUR MICROSOFT PARTNARI

**Intra** er leiðandi innan Microsoft SharePoint við kundum á privata og almenna økinum, bæði í Føroyum og í Danmark. Vit hava hollar royndir innan Microsoft, .NET, SharePoint og Office 2007.